# So skal rennast

**Komandi hósdag er flaggdagur, og sum vant fer Bragdið at skipa fyri flaggdagsrenningini, sum eisini verður skipað sum firmarenning**

FLAGGDAGSRENNING
*Tíðindaskriv*



*Vanliga taka oman fyri 200 fólk lut í flaggdagsrenningini, og fyrireikararnir vóna sjálvsagt, at hetta talið ikki verður lægri í ár*

Eins og undanfarin ár fer Bragdið aftur í ár at skipa fyri renning á flaggdegnum. Byrja verður við Gamla Apotek kl. 16.00, og er tað beint eftir hugnaliga flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn.

### Tilmeldan

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll — skjót og minni skjót, ung og eldri — eru vælkomin. Vaksin renna 7,02 km. og børn, fødd í 1989 ella seinni, renna umleið 1,8 km.

Umframt at vera ein kapping fyri einstaklingar - kappingin er tann fyrsta í árligu Grand Prix renningini — er Flaggdagsrenningin eisini ein kapping ímillum virkir, stovnar o. t., nevnd firmakapping.

Firmakappingin er skipað á tann hátt, at virkini v. m. kunnu tekna 3-5 vaksnar luttakarar á hvørjum liðið, ið so kappast ímóti hvørjum øðrum. Fleiri lið kunnu luttaka frá hvørjum virki, tó skulu kvinnur og menn luttaka á hvør sínum liðið.

Sum nakað nýtt ætlar Bragdið, at býta renningina fyri vaksnu einstaklingarnar í tveir aldursbólkar. Talan er um:

- Bólkur 45 ár og eldri, fødd í 1956 ella fyrr
- Bólkur 44 ár og yngri, fødd í 1957 ella seinni

Hetta skuldi givið størri spenning, og vónar Bragdið, at hetta fer at fáa enn fleiri miðaldrandi og eldri kvinnur og menn at luttaka.

Eftir at komið er á mál fáa luttakararnir frugt og Poptop. Stuðla hesum hava ávikavist P/F Poul Hansen og MBM.

Vinnandi lið og einstaklingar fáa steyp til ognar. Harumframt verða heiðursmerkir latin til nr. 1, 2 og 3. Høvuðsstuðul hjá Bragdinum er P/F Føroya Shell.

Luttøkugjaldið fyri vaksin er kr. 60 og kr. 30 fyri børn. Um luttakandi ynskja at gerast limir í Bragdinum, er eisini møguleiki fyri tí — og tá við samlaðum avsláttri.

Síðsta freist at melda til Firmakappingina er tann 22.04 meðan síðsta freist hjá einstaklingunum er tann 23.04. Sí annars lýsing hesum viðvíkjandi aðrastaðni í blaðnum í dag.

Vanliga luttaka gott 200 fólk — metið er 230 luttakarar - og er kappingin tí tann størsta av sínum slag í Føroyum. Í Bragdinum vóna tey sjálvandi, at árið í ár ikki verður nakað undantak í so máta. Heldur tvørtur ímóti.

# Zuma umhugsar at leingja sáttmálan

**Best umtókti spælarin í FCK, Sibosisu Zuma, umhugsar nú at leingja sáttmálan við felagið, um hann fær tað rætta tilboðið, skrivar B.T.**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Sáttmálaskeiðið hjá Zuma rennur út á sumri í 2004, og tey flestu hava væntað, at FCK fór at selja vandamikla áleypparan í summar fyri at fáa nakað av peningi fyri leikaran.

– Tað er heilt avgjørt ein góður møguleiki fyri, at Zuma leingir sáttmálan, um hann fær tað rætta tilboðið, sigur umboðsmaður hansara, Gary Blumberg.

Fleiri evropeisk stórlið hava sýnt áhuga í suðurafrikanska leikaranum, og tí var ikki væntandi, at hann vildi halda fram í FCK. Men nú er líkt til, at hann hevur kúvent í málinum.

# Hvar er bólturin?




Tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.
Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

**Navn:** ______________________
**Bústaður:** ______________________
**Tlf:** ______________________
**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ______________________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS

Vikuskifti
Nr. 70 • leygardagur • 13. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Fjórða ættarlið sum bryggjari



Lesið s. 4 og 5



*Eftir konsertina hevur fartelefonin hjá Brandi uttan íhald bippað við fittum sms-boðum frá ungum sprundum*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Dreymagentan er sjarmerandi

Væl hevur gingist hjá 12 ára gamla Brandi Enni, eftir at hann fyri góðari viku síðan gav út fløguna ”Waiting In The Moonlight”. Tær ungu genturnar eru púra villar eftir hesum unga drongi, og telefonin hevur uttan steðg bippað við fittum sms-boðum

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Fyri góðari viku síðan gav hann út fløguna ”Waiting In The Moonlight”, sum hann, saman við nøkrum av teim fremstu tónleikarunum í Føroyum, hevur framleitt.

Í hesum sambandi skipaði hann eisini fyri trimum stórum konsertum í Norðurlandahúsinum, og útselt var til hvørja konsert.

Ungar gentur í hópatali høvdu ognað sær atgongumerki til konsertinar, og tær gjørdust ikki vónbrotnar av hesum evnaríka unglingi.

### Dult nummar

Eftir konsertina hevur fartelefonin hjá Brandi uttan íhald bippað við fittum sms-boðum frá ungum sprundum, og summar eru enntá so ósmædnar, at tær eisini tora at ringja til hansara.

- Tað eru mest gentir, sum ringja um alt møguligt. Tær flestu vóru við til konsertirnar, og tær siga, at konsertin var super. Onkrar siga eisini, at eg syngi mega gott, greiðir Brandur frá.

Onkur hevur eisini sagt við hann, at hann er ordiliga fittur, men tað vil Brandur helst ikki, at vit skriva so nógv um.

Men hóast hann heldur, at tað er stuttligt og uppmuntrandi at fáa nógvar afturmeldingar, so kann tað eisini gerast ov nógv av tí góða.

- Tann eina dagin, tá eg kom út eftir ein skúlatíma, stóð ”40 missed call” á telefonini, umframt at eg eisini hevði fingið eina rúgvu av sms-boðum, greiðir hann frá.

Men tíanverri, so órógvar hetta eisini gerandisdagin rættiliga nógv. So Brandur mátti í vikuni skifta yvir til dult nummar.

- Tað er sjálvandi keðiligt. Best hevði verið, um onkur kundi svarað øllum hesum fyri meg, men tað ber so ikki til. Men hvør veit, kanska tað kemur einaferð seinni, flennur hann.

### Dreymagentan sjarmerandi

Hóast nógvar gentur hava ringt og sent sms-boð til Brand, so

*Framhald á síðu 2*